# ar aftur!

var eitt so sera stórt pluss, at okkara røddir riggaðu so væl saman. Janus hevur eina djúpa rødd við nógvum undirtónum, og eg havi eina ljósa rødd við nógvum yvirtónum. Hetta gevur ein heilt serligan klang, tá ið vit syngja saman".

Tór Verland lýsir tónleikin við tveimum mótsigandi heitum. "Eg vil lýsa tónleikin sum glaðan og tristan. Sum sagt, eru eg og Janus sera ymiskir, og sostatt verður tónleikurin eisini ymiskur. Hetta meti eg hevur gjørt sítt til, at bólkurin gjørdist so væl dámdur, tí har var nakað fyri øll".

### Vildu hava tað stuttligt

"Vit hugsaðu ongantíð um at raka ein ávísan málbólk. Tað einasta sum var týdningarmikið fyri okkum var, at vit skuldu hava tað stuttligt", sigur Tór Verland Johansen.

"Hvørki eg ella Janus meta okkum vera tónlistarligar úrmælingar, men eg haldi heldur ikki, at ein noyðist at verða mega dugnaligur fyri at vera kreativur og skapa góðan tónleik. Tað sum vit gjørdu var bara erligt".

### Aftur til tað einfalda

Tór Verland hevur eisini gjørt sær nakrar tankar um, hvønn leiklut Safir hevði á føroyska tónleikapallinum. Tá ið Safir byrjaðu at spæla, byrjaðu summi fólk aftur at seta prís uppá tann einfalda tónleikin. "Vit vóru beinleiðis andsøgn til tann harða rokkin. Hetta var ikki nakað, sum vit hugsaðu stórvegis um, men vit hava hoyrt frá øðrum, at tey vóru glað fyri, okkara øðrvísi íkast til tónleikapallin", sigur Tór Verland.

### Tóku væl ímóti

At Safir vóru væl dámdir vitnar teirra fløga um. Teir góvu eina fløgu út í 1996, og tá vóru teir longu sera væl dámdir í Føroyum. Teir seldu um 2000 eintøk av henni, og hetta er stak nógv í føroyskum høpi. Nøkur av løgunum kláraðu seg eisini heilt væl á 15 teimum bestu. Millum annað lagið Tú ert so deilig. Onkur løg spøkja enn í útvarpinum, og Tór Verland heldur, at føroyingurin tók stak væl ímóti fløguni.

Janus Trúgvason leggur afturat, at teiminingin eisini var sera góð. Hetta var tíðin, tá bólkar fóru frá at geva bond og LP'ir út til at geva fløgur út. Ein fløga var kostnaðarmikil, og eitt band seldi ikki longur, tí kom ikki serliga nógv út tá. Um ólavsøkumundið í 1996 komu bara 2 fløgur út, Safir og Moirae. Hetta gjørdi sjálvandi, at tað ikki vóru so nógvir bólkar ið kappaðust, um at verða spældir í útvarpinum.

### Endin

Safir spældi nógvar konsertir í tíðarskeiðum 1995-1998, men so tagnaði duettin brádliga. "Eg búði í Århus, og Janus búði í Keypmannahavn. Sostatt funnu við ikki so nógv saman longur, og tað gjørdist torført at venja saman", fortelur Tór Verland.

Í 1998 spældu teir eina konsert í Gimle á Amager. Hetta skuldi vísa seg at verða seinasta konsertin hjá Safir í 8 ár. "Eg skal siga tær heilt erligt. Vit grettu ongantíð orð um at gevast, men vit fingu heilt einfalt ongar fyrispurningar longur. So man kann siga, at vit bara bíða eftir, at onkur fer at ringja og biðja okkum koma at spæla", sigur Tór Verland Johansen og flennir.

Janus greiðir frá, at teir báðir hittust fyri nøkrum árum síðan í Keypmannahavn, og settu seg niður við ljóðførunum aftur, og neistin var har beinanvegin. "Vit hava eitt ordiliga gott samband tónlistarliga", sigur Janus Trúgvason.

### Come back

Síðani hevur verið at hoyrt frá Tór Verlandi. Men Janus hevur luttikið í Prix Føroyum sum einstaklingur, og hevur spælt til nøkur tiltøk, men ikki í serliga stóran mun. Men nú í juni fara teir báðir so aftur at kína okkara oyrum við vøkrum tónum á stóra Asfalt tiltakinum. "Vit gleða okkum báðir sum smádreingir til Asfalt. Tað verður stuttligt at spæla aftur, og vit fara sjálvandi at spæla tey góðu, gomlu Safir løgini fyri at minnast aftur á gamlar dagar", sigur Tór Verland Johansen at enda.



*Janus Trúgvason syngur og spælir gittar í Safir*

*Mynd: Símun Jóannesarson*

## Vildi ikki verða tann nýggja Eivør

Janus Trúgvason hevur síðan Safir spælt rættiliga fitt sum einstaklingur og í bólkum. Altíð er tað eitt slag av fólkatónleiki, ið hann fæst við. Í 2001 stillaði Janus upp til Prix Føroyar seks ár eftir, at henda kappingin gjørdist bæði upprunið og lopfjøl hjá Safir.

"Eg vildi statuera eitt eksempul" sigur Janus, "Í reglunum fyri Prix Føroyar stendur, at einstaklingar kunnu luttaka. Men teir hava ikki ein livandi tjans ímóti rokkbólkum. Tað riggaði bara heilt væl, fólk vistu slettis ikki, hvussu tey skuldu reagera"

Janus sigur, at hann hevur havt nógvar ætlanir um fløguútgávur, men at tað hendir ongantíð. Hann er maðurin við hugskotunum og ikki maðurin, ið fær ting at henda. Hann nevnir, at einaferð arbeiddi hann við ætlan um eina fløgu við skjøldrum, kvæðum og vísum, men so gav Eivør sína fyrstu fløgu út, og hann helt, at so var best at lata vera.

Á Fólkatónleikarastevnuni í 2003 luttók Janus við bólki. Saman við Finni Hansen, Eyðuni Hansen og Arnoldi Ludvig spældi Janus egin løg, okkurt lag hjá Anniku Hoydal og nøkur kvæði sett út sum írskur fólkatónleikur.

Janus hevur eisini sungið nógv í kóri. Tá hann búði heima um aldarskiftið, sang hann í Tórshavnar Mannskóri. Komin til Danmarkar fór hann at syngja í Studenterforeningens Sangkor. Hetta er eitt háttvirt kór við langari søgu. Tað er yvir 100 ár og búnin er kjole og hvidt, greiður Janus frá.

